


MYND: JENS KRISTIAN VANG

okkurt annað, sum okkum í grundini ikki tørvar. Jú, tað er yvirdrivið. Men tað kunnu vit ikki lasta handilsfólkinum, tey gera bert sítt arbeiði. Hvør einstakur má sjálvur taka ábyrgdina av tí.

– Viðvíkjandi vættrunum haldi eg, at ein nissa ella tvær eru hugnaligar, og vit hava eisini nissur heima hjá okkum á Strondum. Nissurnar eru eingin hóttan ímóti Jesusbarninum soleiðis sæð, tær skapa tó heldur onga gleði.

> Men mitt í tí heila kom ein brandbilur ýlandi og blinkandi, og fleiri jólamenn komu niður úr einum stiga -meðan eg stóð og bað Faðir vár- og tað tímdi eg ikki.

– Men tað er líkamikið um tað er ein nissa, sum fær teg at keypa, ella ein eingil. Eingilin, sum fær teg at yvirtrekkja kontoina ov nógv, og vakrir jólasálmar inni í einum supermarknaði eru líka skaðiligir sum nissan.

**Hvat heldur bispur um jólaborðhaldini og jólaveitslurnar, sum mynda adventstíðina?**

– Eg haldi, at hetta við at vera á jólafrokosti fleiri ferðir um vikuna í hálvan annan mánað, tað oyðileggur tað serliga við tí. Tá verður tað sum at fara í ein pylsuvogn. Men eg má siga, at ov mikið drekkarí undan jólum, tað er ikki gott. Eg skal ikki vera ágangandi og døma fólk. Men tað er sjáldan, at ovmikið drekkarí veksur um jólafriðin ella hevur frið við sær yvirhøvur.

– Men fólk hava sjálvi ábyrgdina av sínum lívi, og tí er tað ein liður í míni kvøldbøn, at eg skal læra at virða rættin hjá fólki at liva sítt lív, sum tey vilja.

– So er tað eisini hetta, at øll arbeiðspláss við virðing fyri sær sjálvum hava jólatræshald fyri børnunum. Hví hava tey ikki heldur tiltøk uttandura um summarið? Vísa teimum Føroya land ein fagran dag í mai? So kundu børnini sæð náttúruna, heiðafuglin, grasið og landið ístaðin fyri eina nissu í einum grýluskorti. Tað er jú einki gevandi ella stuttligt við tí.

– Møguliga eru vit sjálvi við til at gera lívið til ein glæntrileik ella gera eina parodi uppá tilveruna. Og eg haldi ikki altíð, at tað riggar líka væl at blanda tey fólksligu og tey kirkjuligu jólini saman. Til dømis sigi eg nú altíð nei til at tendra jólatrøini. Eg fari á hvørjum ári burtur í desember mánaði og sleppi mær avstað, áðrenn jólatrøini verða tendrað, tí fólk skilja ikki, hví prestur sigur nei til at tendra jólatræið.

– Men eg havi fyrr roynt at tendrað træið. Tey bóu meg koma og tendra, og síðani skuldi eg lesa jólaevangeliið og biðja Faðir vár. Men mitt í tí heila kom ein brandbilur ýlandi og blinkandi, og fleiri jólamenn komu niður úr einum stiga – meðan eg standi og biði Faðir vár – og tað tímdi eg ikki. Tá máttu tey velja jólamannin ella prestin. Og tá tey ikki funnu útav at velja prestin, so haldi eg meg bara burtur.

> Tað er líkamikið um tað er ein nissa, sum fær teg at keypa, ella ein eingil. Eingilin, sum fær teg at yvirtrekkja kontoina ov nógv, og vakrir jólasálmar inni í einum supermarknaði eru líka skaðiligir sum nissan.

**Er tað farið um mark við gávunum, ella er tað ein vakur siður til minnist um Jesusbarnið, sum varð gávan til okkara?**

– Eg vil mæla til, at vit geva gávur. Kanska skulu vit enntá geva onkrum, sum vit ikki halda hevur uppiborið tað, eina gávu. Men tað er ikki nøgdin ella støddin av gávum, sum telur.

– Í fyrstu syftu gav Gud okkum nakað, sum ikki fekk innivist annað enn í eini krubbu. Hann gav okkum sín son, sum seinni doyði, so tað var ikki serliga glæsiligt. Hann fór ikki í ein supermarknað, eina kongsborg ella gav okkum ein kongsson. Tað var eitt fátækt barn, og tí er tað menniskjað, sum er essensurin í jólunum. Vit kunnu nú siga, at vit hava eitt innara virði, og tað er gávan, sum jólini snúgva seg um.

– Mær dámar best, um gávurnar verða evnaðar. At eiga eina abbadóttur, sum teknar eina mynd, er praktfult. Abbadótturin fær tó helst onkra keypta leiku, men tað er týdningarmikið, at vit taka okkum tíð til at siga børnunum, at hesar gávurnar ikki akkurát eru gleðin. Gleðin er, at abbin er góður við abbadóttrina, og gávan er bara eitt tekin um tann kærleikan.

– Nú eri eg hampuliga væl fyri fíggjarliga, men eg havi eisini roynt at verið minni væl fyri. Og tey stillastu og róligastu jólini, við mest hugna, vórðu kanska tey jólini, tá vit áttu minst. Tá man ikki eigur so nógv, hevur man lyndi at virðismeta tað, sum er. Men tá man satt at siga eigur alt, verður tað torført at gerast veruliga glaður fyri gávurnar. Í grundini eru vit jú vit mettað; vit hava ikki tørv á nøkrum.

– So tað, at eg fái loyvi at vera saman við mínum kæru, og at tey halda meg út, er ein stór gáva. Tey kundu aldrin givið mær ein kekk í staðin, og uttan tey var eg fátækur. Eg haldi, at vit ofta hava lyndi at gloyma, hvussu stór gáva lívið er. Og um ein maður hevur ein vakrari klæðning enn eg, ella ein hatt, sum er hægri enn mín, so er tað í grundini totalt líkamikið.

– Tað, sum telur, er at hvíla í sær sjálvum og í einastu jólagávuni, sum er nakað, nevniliga Kristusi.